# Kvink

## *søkir eftir sølufólki*

Tú kann vænta tær eitt sera sjálvtstøðugt arbeiði, har ið tú m.a kemur at ferðast nógv út í heim at selja okkara skipanir. Umframt, at seta saman tilboð, fyrireika marknaðarátøk o.a.

**Vit vænta, at tú:**

- Dugur væl at orða teg á føroyskum, enskum og donskum
- Ikki er bangin fyri at ringja til kundar og avtala fund
- Ert álítandi
- Hevur holla vitan innan teldur
- Samstarvseginleikar
- Veit um ráki innan telduheimin
- Dugur at seta tilboð saman
- Miðnáms ella hægri útbúgving
- Kann fara uttanlanda á søluferð

**Løn:**
Fast løn umframt provisión.

Er hetta nakað fyri teg, kanst tú senda tína umsókn í seinasta lagi 4. apríl 2005 til:

**Kvink**
**Att: Søluarbeiði**
**Postbox 3058**
**110 Tórshavn**
**Føroyar**

**Ella til rwd@isuus.com**

*Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til Regin W. Dalsgaard á telefon 596061*

*Kvink er eitt felag, sum Dynamic Paper P/F, Emperi Tech Sp/F og ISUUS Mobile Sp/F eiga saman. Vit arbeiða innan útvikling av ritbúnaði, sølu og tænastu. Vit eru í ferð við at víðka um virksemi í Føroyum og uttanfyri Føroyar.*

# Eftirlitsfólk

Vegna barnsburðarfarloyvi er eitt starv sum fysio-/ergoterapeutur á Arbeiðseftirlitinum leyst at søkja í tíðarskeiðnum frá 1. mai 2005 til 1. apríl 2006. Arbeiðstíðin er 75 % av fullari tíð. Arbeiðsøkið fevnir um alt landið, men hevur viðkomandi tilhald í Tórshavn.

**Útbúgving.** Viðkomandi skal hava útbúgving sum fysio- ella ergoterapeutur og helst hava praktiskar royndir innan fakið.

**Arbeiði.** Viðkomandi, sum settur verður í starvið, kemur at arbeiða ógvuliga sjálvstøðugt, men í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á Arbeiðseftirlitinum.

Umframt at røkja starvið innan sergreinina fysio-/ergoterapi, skal viðkomandi eisini taka sær av øllum vanligum eftirlitsarbeiði hjá Arbeiðseftirlitinum og luttaka í okkara skeið- og kunningararbeiði.

**Løn.** Lønin verður sambært sáttmála millum Fysio-Ergoterapeutfelagið og Føroya Landsstýri.

**Annað.** Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Arbeiðseftirlitið, tlf. 357811 og tosa við Elinborg á Lofti.

Skrivlig umsókn við próvskjølum og møguligum ummælum skal vera Arbeiðseftirlitinum í hendi í seinasta lagið 6. apríl 2005.

**Arbeiðseftirlitið**

Arbeiðseftirlitið · Falkavegur 6 · 110 Tórshavn · Tlf.: 357811 · Fax: 357810 · arb@arb.fo

*Arbeiðseftirlitið er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum høvuðsuppgávu at umsita løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi. Harumframt umsitur Arbeiðseftirlitið lóg um spreingievni, kavaravinnu og løggildar vektir og nøgdarmátarar. Arbeiðseftirlitið hevur skrivstovu í Tórshavn, har 12 fólk starvast.*

**Uppgávurnar hjá Arbeiðseftirlitinum eru, í spurningum um arbeiðsumhvørvi, at:**

1. vegleiða virkjunum, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og almenninginum í spurningum, ið hava arbeiðsumhvørvisligan týdning,
2. hjálpa landsstýrismanninum við fyrireikingunum av reglunum sbrt. lógini,
3. áseta nærri fyriskipanir við heimild frá landsstýrismanninum,
4. kunna seg um teknisku og sosialu menningina í samfelagnum við atliti til at betra um arbeiðið, hvat trygd og heilsu í arbeiðsumhvørvinum viðvíkur,
5. viðgera ætlanir til framleiðsluhættir, arbeiðspláss, tøknilig hjálpartól v.m., evni og tilfar og geva loyvi, sum eru í samsvari við lógina ella fyrisitingarligar reglur,
6. ansa eftir, at lógin og tær fyrisetingar, sum verða gjørdar við heimild í lógini, verða hildnar.

**Visti tú ikki tað?** Sosialurin

# HALDIÐ SOSIALIN






TEKNA TEG SUM HALDARA **NÚ.**
**450 kr** UM ÁRSFJÓRÐINGIN
-SPARIÐ **395 kr** Í MUN TIL LEYSASØLU

950,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(650,- kr. fyri 1 ferð um vikuna · 5 bløð)

Sosialurin | ARGJAVEGUR 26 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ________

Bústaður: ________

Postnr.: ________

Bygd/býur: ________

Telefon nr.: ________

Undirskrift: ________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin 341800